Ársfrágreiðing fyri 2020/2021

Skúlin í Eysturkommunu

Síðani 1. januar 2013 hevur leiðslan í skúlanum fyri Eysturkommunu virkað við einum skúlastjóra og einum varaskúlastjóra/ deildarleiðara. Atli Fróði Johansen er skúlastjóri, og Birgit Frederiksberg er varaskúlastjóri. Leiðslan hevur eitt skrivstovufólk afturat sær hálva tíð.

Skúlastýrið hevur eftirlit við virksemi skúlans, sum ikki er lagt undir aðrar mynduleikar. Í skúlastýrið verða trý foreldraumboð vald, tvey kommunustýrisumboð og eitt starvsfólkaumboð. Formaður og næstformaður skulu veljast millum foreldraumboðini. Skúlastjórin er skrivari í skúlastýrinum. Skúlastýrið, sum tók við í 2021, skipaði seg soleiðis:

Eydna Lucia Nesá, forkvinna
Katrin Ingolfsdóttir Gregersen, næstforkvinna
Elinborg Osvaldsdóttir, foreldraumboð
Magnus Skoralíð, kommunustýrisumboð
Marjun Andreasardóttir, kommunu-stýrisumboð, Signar á Reynatrød, starvsfólkaumboðog Atli F. Johansen, skrivari.
1. varalimur er Noomi Gregersen og 2. varalimur er Rebekka Olsen fyri foreldrini.

Skúlastýrið situr í 4 ár.

Í mai var skipað fyri einum felags skúlastýrisfundi saman við skúlastýrinum úr Fuglafjarðar skúla. Hettar riggaði væl og var avgjørt at endurtakað hettar samstarvið árliga.

Næmingar

Skúlaárið 2016-2017 gingu 258 næmingar í skúlanum. 126 í Skúlaspíranum og innskúlingini í Leirvík og 132 í miðdeildini í Gøtu.

Skúlaárið 2017-2018 ginga 273 næmingar í skúlanum. 140 í Skúlaspíranum og innskúlingini í Leirvík og 133 í miðdeildini í Gøtu.

Skúlaárið 2018-2019 gingu 274 næmingar í skúlanum. 132 í Skúlaspíranum og innskúlingini í Leirvík og 142 í miðdeildini í Gøtu.

Skúlaárið 2019-2020 gingu 266 næmingar í skúlanum. 136 í Skúlaspíranum og innskúlingini í Leirvík og 130 í miðdeildini í Gøtu.

Skúlaárið 2020-2021 gingu 271 næmingar í skúlanum. 135 í Skúlaspíranum og innskúlingini í Leirvík og 136 í miðdeildini í Gøtu.

Skúlaárið 2021-2022 ganga 284 næmingar í skúlanum. 141 í Skúlaspíranum og innskúlingini í Leirvík og 143 í miðdeildini í Gøtu.

Árgangirnir eru um 35 næmingar í miðal.

Hetta er í nógvar mátar ein góð skúlastødd. Bæði fyri einstaka næmingin og fyri skipanina av undirvísingini og skúladegnum. Næmingatalið ger nevniliga, at allir næmingar hava lættari við at finna sín javnlíka og trívast, og skúlin fær eisini so mikið væl av tímum, at til ber hjá leiðslu og lærarum at fyriskipa og geva eina góða og fjølbroytta undirvísing.

Starvsfólk

Í skúlanum eru 26 lærarar, 2 námsfrøðingar, sum arbeiða í Skúlaspíranum og 4 námsfrøðiligir stuðlar. Seinasta skúlaár fór ein lærari frá vegna aldur. Tað var Julia Lamhauge.

Skúlastýrið skipaði í Vár fyri einum fundi saman við lærarunum, har evnið Strongd var viðgjørt. Fundur eydnaðist væl.

Mannagongdir og vegleiðingar

Skúlin í Eysturkommunu hevur fleiri mannagongdir og vegleiðingar, sum eru til at taka í ávísum støðum, og aðrar eru við til at mynda dagligdagin á skúlanum.
Á vári 2017 var trivnaðarætlanin góðkend av Mentamálaráðnum. Ætlanin er rættuliga umfatandi, hon umfatar nógvar lutir, sum á ein ella annan hátt kunnu vera viðkomandi fyri at skapa tryggleika og trivna á einum skúla.
Somuleiðis hevur skúlin eina sorgarætlan. Sorgarætlanin er gjørd fyri, at foreldur, lærarar og leiðsla skulu vita, hvør mannagongd verður brúkt, tá sorg rakar skúlan.
Ætlanirnar kunnu lesast á skeyk.fo.
Frávera á skúlanum verður nú skrásett talgilt.

Hølisumstøður

Samanumtikið eru hølisumstøðurnar góðar á fleiri økjum, men skúlastýrið hevur tó havt nøkur ynski um ábøtur bæði í skúlanum í Leirvík og í skúlanum í Gøtu. Serliga eru tað viðurskifti, sum blivu útsett í sambandi við umbyggingina.
Á vári 2017 heitti skúlastýrið á leiðsluna um at gera eina tørvskanning fyri báðar skúlarnar. Tørvskanningin var býtt upp í tveir partar: ein bráðneyðugan part og eina langtíðarætlan. Hetta var síðani sent víðari til kommununa til støðutakan og kunning.

Hugsanin við tørvslýsingini er í fyrsta umfari at gera dagføringar, so skúlin líkur nútímans krøv, men so eisini framyvir at kunna halda skúlan á einum høgum støði.

Hendan tørvslýsing broytti ikki nógv. Sitandi skúlastýrið heitti tí á býráðið, um at fáa fakfólk at gera eina tørvslýsing. Sitandi býráð hevur nú set ein bólk, sum skal gera eina lýsing av báðum skúlunum. Hetta arbeiði er fari ígongd og tað fegnast vit í skúlastýrinum um.

Skúlastýrið hevur eisini heitt á Eysturkommunu um at fáa fleiri skeltir upp, bæði inni á skúlunum og eisini skeltir, sum vísa hvar skúlin er staðsettur. Hettar arbeiði er farið ígongd.

Innskúlingin. Allir 8 flokkar hava sína heimastovu, so nú ber til at býta allar árgangirnar. Serstovan/førleikastovan hevur eina stovu, sum kann býtast í tvey. Harumframt hevur skúlin fimleikahøll, svimjihøll, bókasavn og miðhøll og eina stovu til fyrireiking. Tó harmast vit um at vit mangla fakstovur í innskúlingini.

Miðdeildin. Allir 8 flokkar hava sína heimastovu, og førleikastovan hevur sína egnu stovu. Harumframt hevur skúlin fimleikahøll og bókasavn og serstovur til tónleik, heimkunnleika, smíð, evning og náttúrulærugreinar.

1929-bygningurin hevur havt trupulleikar við soppi. Ymiskar ábøtur eru gjørdar, og m.a. er nú drenað kring bygningin. Ein útsúgving er eisini gjørd í smíðstovuna.
Skúlastýrið hevur heitt á kommununa um at taka støðu til, hvørjar ætlanir eru fyri 1929-bygningin. Trupulleikar eru enn við bygninginum, hóast ábøtur eru gjørdar. 1929-bygingurin er patur av tørvslýningini, sum er farin í gongd.

Hølisumstøður er nakað, sum fyllir nógv í arbeiðinum hjá skúlastýrinum. Á hesum økinum sóknast vit í skúlastýrinum eftir einari langtíðarætlan frá kommununi. Ein langtíðarætlan, sum í fyrsta umfari fer at hava við, at gera dagføringar, so skúlin líkur nútímans krøv, men so eisini framyvir at kunna halda skúlan á einum høgum støði.

KT - útgerð

Á skúlanum í Eysturkommunu stendur væl til við KT - útgerð. At kalla øll útgerðin er skift út fyri kortum.

Skúlin arbeiðir við at fáa ílag eina skipan, har kommunan ger eina avtalu við ein veitara, sum kann tryggja at skúlin hevur KT - útgerð sum eru tíðarhóskandi, so skúlin líkur nútímans krøv.

TÍTT

Síðani 2014 hevur innskúlingin verið við í hesi skipanini. Skipanin verður eisini brúkt í dagstovnunum og frítíðarskúlanum. TÍTT merkir "tiltøk í tøkum tíma". Endamálið við hesi skipan er at fylgja trivnaðinum hjá øllum næmingum og at seta inn við hjálp hjá næmingum, sum av eini ella aðrari orsøk ikki trívast nóg væl. Ætlanin er nú eisini at fara undir at brúka TÍTT í miðdeildini.

Uttanduraøkið

Í **innskúlingini** er umbyggingin av spæliplássinum liðug. Í heyst var byrja at borða hol fyri jarðhita á økinum omanfyri skúlan. Hettar vísir seg at vera meira umfatandi enn av fyrstan tíð hildið og verður væntandi liðugt á sumri 2022.

Í **miðdeildini** hava børnini tveir góðar FIFA-vøllir at spæla á. Annar vøllurin hevur vanliga stødd, meðan hin er ein stórur FIFA-vøllur. Næmingarnir skiftast um at brúka hesar vøllir.

Næmingarnir hava eisini eitt gott øki millum skúlabygningarnar, sum er lagt við asfalti. Her ber til at spæla onnur spøl. Umframt hetta sleppa børnini at spæla runt um allan skúlan.

Nýtt og gott spæliplass er gjørt niðanfyri nýggja partin av skúlanum.

Felagstiltøk fyri skúlarnar

Umráðandi er skapa nakrar felags siðvenjur fyri skúlan, sum kunnu styrkja samleikan og kunnleikan hjá næmingum, starvsfólki, foreldrum og lokalumhvørvinum sum heild. Jólini og dansitíðin hava í so máta hepnast sera væl.

Síðsta skúladag fyri jól fara allir næmingarnir í kirkju. Kirkjugongdin verður annaðhvørt ár í Leirvík og annaðhvørt ár í Gøtu.

Felagsdansidagarnir eru tveir í tali. Ein í Leirvík og ein í Gøtu. Avtalað er, hvørji kvæði vit læra, so allir næmingarnir hava lært tað sama.

Alt hetta, sum eitur felagstiltøk, hevur ikki gingið væl í ár. Vegna korona hava vit ikki kunna gjøgnum fört hetta, í tann mun sum ætlanin var.

Skipanir og tiltøk

Mjólkarskipanin er ein skipan, har allir næmingar kunnu keypa mjólk í skúlanum.

Litir í leiki. Hetta er eitt tónleikatilboð í 1. til 3. flokki, har tað við miðvísari undirvísing og samanspæli hvørja viku verður arbeitt við at menna tónleikaliga førleikan hjá næmingunum. Kommunan hevur játtað eina royndarskipan, í ár eru 6 næmingar í 1. flokki og 6 næmingar í 2. flokki við í skipanini.

Matpakkin. Skúlin í Eysturkommunu er knýttur til skipanina hjá matpakkin.fo. Her hava foreldur møguleika at keypa matpakka til næmingarnar, um tey ynskja tað.

Jól og føstulávint. Báðar deildirnar bjóða foreldrum í skúlan í sambandi við jólahald og fastalávintshald.

Eftirmetingar av øllum næmingum eru tvær ferðir árliga. Hesar eftirmetingar verða brúktar í sambandi við foreldraviðtalur.

Foreldrafundir og foreldraviðtalur eru tvær ferðir árliga. Har kunna starvsfólkini foreldrini um skúlagongdina.

Spæliliðið er ein skipan, sum fór í gongd hetta skúlaárið. Spæliliðið eru 6 næmingar í 7. flokki, sum hava verið á einum serligum skeiði í at skipa fyri spølum í fríkorterunum. Tey spæla við 4. flokkarnar eitt fríkorter um vikuna. Spælt verður í fimleikahøllini og úti, tá tað viðrar.

Rennidagur er fyrst í skúlaárinum.

Útferðir verða gjørdar, og 6. flokkur fer á hvørjum ári á seturskúla í Føroyum við flokslæraranum.

Barnasangfagnaður. Í mai fer 3. flokkur til barnasangfagna í Norðurlandahúsinum.

Flogbørn. 3.-4. Flokkur fær undirvísing í kidsvolly. Hetta endar við eini økiskapping.

Talv. Skúlin í Eysturkommunu er partur av eini royndarskipan við, at næmingar í innskúlingini hava talv ein støddfrøðitíma um vikuna. Umframt hetta er talv nú ein partur av tímunum í handaverki og list í miðdeildini.

Listaleypurin. Tvær, onkuntíð tríggjar ferðir árliga fær skúlin vitjan av Listaleypinum. Í ár hava vit í innskúlingini havt vitjan av samljóðkonsert LYD PORT, meðan framførðslan við HEARTBEAT tíverri mátti avlýsast vegna coronu smittu.

Vikuskematímar. Nakrir lærarar eru farnir undir at arbeiða nakrar tímar um vikuna við einum øðrvísi hátti at skipa tímarnar. Hátturin er danskur og kallast *Ugeskemarevulutionen.*

Eldrasambýlini. Innskúlingin liggur tætt við Giljagarð. Her hevur skúlin ta skipan, at ein flokkur fer hvørja viku at vitja. Næmingarnir heilsa upp á búfólkini og syngja fyri teimum. Giljagarður bjóðar bollar og kakao.

Miðdeildin vitjar eldrasambýlið Gøtubrá, nakrar ferðir um árið. Serliga í sambandið við Lusiagongd og føstulávint.

Næmingalagað undirvísing. Í sambandi við at kunna næmingalaga undirvísingina betur, eru tímarnir í støddfrøði í miðdeildini lagdir saman soleiðis, at 4. og 5. flokkur hava lærugreinarnar samstundis og 6. og 7. flokkur samstundis. Hetta letur upp fyri møguleikum, sum at kunna býta næmingarnar í øðrvísi bólkar enn vanliga floksuppbýting, so næmingar við á leið sama tørvi, og á leið somu avbjóðingum kunnu arbeiða saman og læra saman.

Næmingaráð. Sum nakað nýtt, hevur miðdeildin sett á stovn eitt næmingaráð. 1 næmingur úr hvørjum flokki verður valdur inn í næmingaráðið, sum í ár eru 8 í tali. Signar á Reynatrø er samskipari fyri næmingaráðið. Næmingaráðið hevur fund 1 ferð um vikuna, og skipar fyri 2-3 tiltøkum um árið. Næmingaráðið hevur til uppgávu at arbeiða fyri áhugamálum hjá næmingum í skúlanum, m.a. viðurskifti, ið hava við skúlagongdina, fysisku karmarnar á skúlanum, sosial viðurskifti og gerandisdagin í skúlanum at gera.

Nógv av hesum tiltøkunum, sum vanliga eru á skránni gjøgnum árið, hava ikki gingið so væl í ár. Vegna korona hava vit ikki kunna gjøgnumført hetta, í tann mun, sum ætlanin var.

Heimasíðan

Á heimasíðuni hjá skúlanum skeyk.fo verður kunnað um tiltøk og annað í skúlanum. Heimasetningurin er somuleiðis at finna á heimasíðuni.
Skeyk stendur fyri **sk**úlin í **Ey**stur**k**ommunu.